# Tónleikasending til útbjóðingar

**Arbeiðsheiti:** Mono
**Miðil:** Útvarp/heimasíða
**Hvat:** Ein vikulig tónleikasending í fimm pørtum í vetrarskránni 2024/25, t.e. frá september 2024 til juni 2025
**Longd:** 50 minuttir
**Innihald:** Ymsar tónleikasjangrur
**Staðseting:** Mentan, Kringvarp Føroya
**Redaktionell ábyrgd:** Mentan

## LÝSING

Talan er um tónleikasending, sum verður gjørd í røðum við fimm pørtum hvør. Tað merkir, at tú bjóðar teg til at gera eina røð við tónleikasendingum, har tú sjálv/-ur gert av, hvat slag av tónleiki, tú hevur hug at lýsa og spæla.

## KRØV TIL TILBOÐSGEVARA

Eina lýsing av hvørja tónleikasjangru tú kundi hugsað tær at spælt, og hvussu tú hevði hugsað tær at lagt sendingina til rættis. Tað veri seg tónleikavalið, hvussu sendingin skal byggjast upp og tín vertsleiklut.

Vit leggja dent á innihaldsliga dygd, góða útvarpsrødd, gott føroyskt mál og holla vitan um tónleik.

## KRINGVARP FØROYA KANN VEITA

- Upptøkuhøli
- Atgongd til savn
- Keyp av tónleiki
- Útgerð
- Ljóðtøkning
- Redaktør

## LØN

Løn/samsýning verður latin sambært avtalu.

KVF tilskilar sær rættin til at leggja dent á yrkisføri og veitingartrygd.

KVF tilskilar sær somuleiðis rættin til at vraka øll innkomin tilboð.

Freistin at bjóða seg fram til at gera sendingina er 16. september 2024.

Umsókn skal sendast til teldubústaðin: utbod@kvf.fo

KRINGVARP FØROYA

Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur, almennur stovnur, sum virkar óheftur av politisku skipanini. Eitt stýri við sjey limum stjórnar stovninum. Virksemið verður fíggjað við kringvarpsgjaldi og inntøkum frá kunngerðum, ískoytisveitingum og eydnuspølum. Kringvarp Føroya hevur fýra deildir: Aktuelt, Mentan, Tøkni og Fyrisiting.